# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Minningarorð um pápa mín

## Knút S. Ellingsgaard

**24.10.1937 – 19.07.2004**



At pápi skuldi takast frá okkum so brádliga, kom okkum ógvuliga dátt við, men vit mugu bara sanna, at eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir.

Pápi, tú bleiv sjúkur 2/2-2004, eftir stutta sjúkralegu andaðist tú 19/7-2004, einans 66 ára gamal. Hjá okkum, sum eftir sita, er tað ein troyst, at tú ikki stríðist við langa sjúkralegu við nógvari pínu, men at tú sovnaði stillisliga inn. At tú skuldi leggja árarnar inn nú, var ikki júst tað tú hevði roknað við, tín ætlan var at arbeiða eitt ár afturat, fyri síðan at nýta tíðina heima við hús, í havanum og í bilhúsinum, men so skuldi tað ikki verða. Nei, Harrans vegir eru ikki okkara vegir.

Hóast tú ert farin, so liva tey ríku minnini, eg havi eftir teg. Takk fyri allar løturnar, vit høvdu saman í báti, í bilhúsinum og tá tú var á Argjum og hjálpti til við einum og hvørjum, um tað var at skifta vindeygu, hurðar ella okkurt heilt annað, tú var altíð til reiðar.

Góða mamma, tankar mínir eru hjá tær. Tú merkir best til tómrúmið eftir pápa, ja, tað verður ikki heilt tað sama at koma til Leirvíkar nú. Má Harrin styrkja teg og tykkum.

Góði pápi, takk fyri alt.

*Sov søtt, á vinur, sov og hvíl teg nú!*
*Vit vildu, tú hjá okkum skuldi búð;*
*Men tryggari hjá Jesus ert tú –*
*Farvæl, farvæl, farvæl!*

Ærað veri títt minni.

**Sonur tín Herolv**

Tøkk

Vit vilja fegin takka øllum teimum sum vóru við til at gera gullbrúdleypsdag okkara so hugnaligan. Eisini takka vit øllum sum gleddu okkum við gávum, blómum og telegrammum

Jóna & Hans Jákup Joensen

## Elisabet Thomsen í Hornabø farin



Mánakvøldið 26. juli andaðist Elisabet Thomsen 93 ára gomul. Hon var fødd í Havn 30. august 1910, dóttir Jacob Joensen við Stein og Annu Margretu Matras úr Bug í Hvannasundi. Hon var nummar seks av átta systkjum og einasta systir. Brøður hennara vóru, Hans Sundstein, Dánjal Jákup Joensen, Karl Joensen, Niels í Buð, Albert Joensen, Jørgen Joensen (doyði 8 mánaðir gamal) og Eilef Joensen, ið enn er á lívi og býr í Herning.

Elisabet vaks upp í Havn, men hon var eisini nógv norðuri í Bug hjá mostur og mammubeiggja, ið bæði vóru ógift. Hon byrjaði at ganga í skúla har norðuri.

Sum ung arbeiddi hon eitt skifti í køkinum á Købmandshvile í Hørsholm. Elisabet giftist í 5. februar 1938 við Edvini Thomsen úr Nólsoy, og tey fingu fimm børn: Kjeld f. 1938 (doyði í jan. í ár), giftur við Poulu Højgaard av Toftum, Jákup f. 1940, Tummas Pauli f. 1945, giftur við Odny Johansen av Eiði, Margreta f. 1947, gift við Mariusi Trondesen úr Skálavík (doyði av vanlukku), gift aftur við Ólavi Clementsen og Matilda f. 1952, gift við Tom Nielsen úr Odense.

Fyrstu árini búðu tey í Tórsgøtu, men bygdu í Hornabø beint eftir kríggið. Edvin sigldi sum skipari í yngri árum, men bygdi so uppí húsini og fór at handla í Hornabø í 1964, og har komu Elisabet og hann at arbeiða og búleikast restina av lívinum. Edvin doyði í 1984, og tá helt handilin uppat. Elisabet hevur havt góða heilsu og kláraði seg sjálva til ellisár. Men árini krevja sítt, og seinastu trý árini hevur hon búð á Lágargarði.

Elisabet var eitt sera vinsælt og fyrikomandi menniskja - tað bera øll henni, sum kendu hana, og tey eru mong.

Ommubørn hennara eru 9 og langommubørnini 7.

### Minningarorð um

## Valdemar Djurhuus,

### fyrrverandi sýslumann í Eysturoy!



21. juli doyði Valdemar áttatiseks ára gamal, í Tórshavn, har hann búsettist tá hann fór frá fyri aldur.

Í Fuglafirði varð hann oftast nevndur sýslumaðurin ella bert Valdemar, ikki tí hann var einnevndur, men hansara lyndi var soleiðis háttað, at flestu dámdu henda friðarliga, smílandi og sáttliga sumbingin, sum altíð hevði stundir og orku at taka sær væl av sínum sýslubørnum. Hjálpsamur sum fáur, og neyvan vóru tað mong, sum ónøgd fóru út aftur av skrivstovu hansara.

Umframt at verða skemtiligur, orðafróður og góður frásøgumaður, hevði hann listarligar gávur, soleiðis at hann eisini á ellisárum var við á mongum málingaframsýningum, til dømis hevði hann fastan bás tey seinastu nógvu árini á Lions í Runavík, eisini á páskum í ár.

Hansara fyrstu ár her í bygdini búði hann hjá foreldrum mínum, og stendur hendan tíðin sera livandi fyri okkum.

Friðarligur og góður at hava við at gera, eitt sindur skálkaligur til tíðir. Sá nógv, sum vit onnur høvdu ilt við at skilja og leggja til merkis, læs nógv og ofta fekk hann sera nógv burturúr "tekniserium", sum tá fingust í kioskini í Syðrugøtu.

Hann kundi í fríløtum sita og smáflenna við einum blaði ella eini hugaligari bók, soleiðis at tú kundi hugsa tær at fáa lut í undirhaldinum.

Væl lá fyri at tekna, endurgevingin var livandi og eingin ivi um, hvønn ella hvat hann endurgav.

Gamli lágvaksni maðurin við brillunum á nøsini og rísna yvirskegginum, har stóratá júst náddu gólvinum og høvdi var fitt petti lægri enn stólabaki, var onki eindømi.

Konan við urtagarðinum, sum ikki fekk trø og blómur at vaksa nóg skjótt, hana hevði Valdemar ofta gott prát við. Hevði eisini uggandi orð at geva, helst eisini eitt sindur skálkakend við hvørt, helt fyri ein góðan summardag: "Nú tykjast runnarnir at skunda sær. Sá í gjár, at ein ketta bleiv heilt burtur aftan trøini"! tá vóru tey eini 4-5 ára gomul.

Soleiðis var sýslumaðurin, og ongin tók sær tykni av speisemi hansara.

Tær góðu og ríku løturnar ognast bert teim, sum áttu tær, men eru hesar frálíkar at lívga og geva øðrum!

Sanna fór undan og nú flutti Valdemar, sýslumaðurin!

Teirra dagar vóru runnir, minnini um hesar friðarligu og góðu grannar verða goymd í hugaheimi várum!

Við samkenslu til Esther, Jóhan, Dagny, Karl og øll tykkara!

**Ditlev Róin**

### Dagurin

5. august. Ásvaldur, deyður í 642. Enskur kongur, sum var sera ágrýtin í trúboðaravirki í landi sínum. Millum annað bygdi hann á oynni *Holy Island* við landnyrðingsstrond Onglands kleystrið Lindisfarne, ið víkingar løgdu í oyði í árinum 793. Ásvaldur fell í einum bardaga við heidna kongin Mercia.

Navnið er gamalt enskt, ið merkir *Guð ræður.*

# Bilar

Nr. 146 • hósdagur • 5. august 2004 • 78. árg.



*C8 innan. Instrumentborðið er av nýggja designinum við instrumentunum í miðjuni. Framman fyri bilføraran er eitt panel við ávaringarlampum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Citroën C8 sum MPV og Van



*Citroën C8 er ein stórur og rúmligur bilur við stórari baklúku og elskjótihurðum í síðunum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Citroën C8 Van bleiv saman við øðrum kosin sum ársins vørubilur í Danmark 2003*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Citroën C8 fæst bæði sum MPV við upp til átta sitiplássum, og sum Van við vørurúmi ið er næstan 3 rúmmetrar stórt*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Citroën C8 er komin sum avloysari fyri Citroën Evasion. Bilurin er stórur og rúmligur og fæst bæði sum MPV við upp til átta sitipassum og sum Van við næstan 3 rúmmetra stórum vørurúmi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hjá barnafamiljum ella hjá teimum sum hava brúk fyri nógvum plássi, er Citroën C8 bilurin at ogna sær, við nógvum møguleikum til nógv ymisk endamál.

Hóast C8 líkist forgangaranum er talan um ein heilt nýggjan bil. Bilurin fæst í ymsum útgerðs útgávum, Advance, Prestige, Elegance og Exclusive. Bilurin ið vit royndu var ein Elegance, og tá hevur hann til dømis fjarstýrdar elskjótihurðar á báðum síðum. Hetta lættir munandi um hjá teimum, sum skulu inn og út úr bilinum.

Citroën C8 fæst bæði sum MPV við upp til átta sitiplássum, og sum Van við vørurúmi ið er næstan 3 rúmmetrar stórt. Bilurin verður gjørdur á somu fronsku bilverksmiðju sum Peugeot 807, Fiat Ulysse, og Lancia Phedra.

Setrini kunnu flytast, snarast ella takast út, alt eftir hvat bilurin skal búkast til. Av tí at hondbremsan situr vinstrumegin førarasetrið, og girstongin er í instrumentborðinum, er gott pláss at ganga millum setrini. Instrumentborðið er av nýggja designinum við instrumentunum í miðuni.

C8 fæst við trimum ymiskum bensinmotorum: 2,0i við 138 hk, 2,2i við 160 hk og 3,0 V6 við 208 hk, og tveimum HDI dieselmotorum við ávikavist 110 og 130 hk.

Viðvíkjandi trygdini hevur C8 airbag framman, í síðunum og gardinairbag.

Umframt ABS, hevur bilurin eisini EBA (Emergency Brake Assistent) EDB (Elektroniskan bremsukraftdeilara) og ESP (Elektroniskt Stabilitets Program).

Citroën C8 hevur eyðkendar franskar koyrieginleikar við eini servostýring, ið tillagar seg ferðina.

Bilurin vit royndarkoyrdu hevði t.d. heilautomatiskt klimaanlegg, parkeringssensorar í bakkúfangaranum, fartpilot og el-skjótihurðar.

Saman við Peugeot 807 og Fiat Ulysse bleiv Citroën C8 kosin til "Årets Varebil i Danmark 2003". Teir vunnu t.d. uppá at teir hava skjótihurðar í báðum síðum, stóra baklúku, stórt og rúmligt vørurúm ið er gott at koma til, rattið kann stillast allar vegir og teir eru góðir at koyra, eisini fult lastaðir.

### Citroën C8 2,2 HDi Elegance Van

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,2 litur 4 syl. diesel við 130 hk v. common-rail innspræning |
| 0-100 km/t: | 13, 4 sek |
| Oljunýtsla: | 13,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 215/60-16 (Nýggj dekkstødd) |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 472,6 cm |
| Breidd: | 185,4 cm |
| Hædd: | 175,2 cm |
| Eginvekt: | 1575 kg |
| Totalvekt: | 2500 kg |
| Vørurúm: | 2948 litrar |
| Prísur: | kr. 295.000,- v/mvg. |
| Søluumboð: | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |